

# Must-see: Tivoli

## Keypmannahavn: Tivoli lat upp í 1843, og telist millum heimsins elstu stuttleikaparkir.

Hóast parkin varð løgd fyri so mongum árum síðani, er støddin í dag tann sama sum tá.

Hvørt einasta ár vitja beint niðanfyri 4 mió fólk í Tivoli, og er hetta mest vitjaða ferðastaðið í Danmark. 87 prosent av teimum vitjandi eru danir.

Um hugt verður eftir líknandi parkum í útheimi, so er Tivoli á einum 3. plássi, tá talan er um vitjanir. Bert Disneyland Paris og Europa Park í Týsklandi hava fleiri vitjanir enn Tivoli.

Tivoli í Keypmannahavn er kortini annað enn ein stuttleikapark. Her finst eisini ein ævintýrgarður sum nógv bara njóta at ganga ígjøgnum.

Ein partur av skránni eru tær serstøku rokk-konsertirnar fríggjakvøld. Millum tey sum fara at framføra her í summar eru Roxette, Savage Rose, Sort Sol, Nick&Jay og okkara egni Teitur, ið verður at hoyra her 10. juni.

Umsetningurin hjá Tivoli liggur um 950 mió krónur um árið. Her arbeiða 1500 fólk um summarið, sum svarar til 782 fulltíðarstørv.

